FØROYA FISKIMANNAFELAG

# FORMANSFRÁGREIÐING 2015

# Formansfrágreiðing 2015

Vælkomnir á Landsfund hjá Føroya Fiskimannafelag.

Formansfrágreiðingin hjá mær er heldur hugaligari í ár enn fleiri av undanfarnu árunum, skilt á tann hátt, at gongdin í fiskiskapinum hevur gingið rætta vegin.

Skipini hava gjøgnugangandi havt betri fiskiskap í 2015 enn tey síðstu árini. Tølini um hetta eru at síggja aftast í frágreiðingini.

## Sáttmálabetringar

Á fleiri økjum tóku vit eisini nøkur fet tann rætta vegin, tá sáttmálin bleiv undirskrivaður 27. mai í ár.

Av røttum skuldi sáttmálin verið fingin í hús longu 1. januar, tá tann gamli gekk út, men vegna millumlanda fiskivinnusamráðingar vórðu sáttmálasamráðingarnar fyrst útsettar og drógu síðani eisini nakað út.
Øvugt av hinum báðum manningarfeløgunum søgdu vit tó nei til at leingja gildistíðina á gamla sáttmálanum.
Sostatt fingu allar broytingarnar í okkara sáttmála gildi frá 1. januar 2015 at rokna, meðan sáttmálin hjá hinum báðum feløgunum fekk gildi 1. juli.

- Millum annað fingu vit býtisprosentið hjá botnfiskatrolarunum aftur á støðið fyri 2011, nevniliga 27 fyri bæði partrolarar og lemmatrolarar.
- Sáttmálaásetta býtisprosentið hjá frystilínuskipunum fór úr 37 upp í 40 prosent.
- Fastmynstraðir menn fáa eitt ískoyti á 1500 krónur um árið til olju- og arbeiðsklæði.
- Línugjaldið er strikað.
- Dagískoytið hjá kokkunum er hækkað úr 50 í 75 krónur um dagin.
- Skipsarbeiði verður nú lønt við handverkaraløn og samsvarandi yvirtíðarløn.
- Inntøkutapstryggingin er betrað soleiðis, at hon tekur við frá 8. degi, sama hvussu leingi skipið er úr vinnu vegna brek (fyrr skuldi skipið vera minst 14 dagar úr vinnu).
- Setanartreytirnar fyri avloysarar eru betraðar.
- Og endiliga er 2. jóladagur nú sáttmálatryggjaður frídagur hjá heimaflotanum.

Viðvíkjandi hesum seinasta mugu vit tíverri staðfesta, at longu hesi jólini, tá ásetingin fyrstu ferð var í gildi, brutu ikki færri enn fimm skip sáttmálan og loystu 2. jóladag. Eitt teirra vendi tó við og kom innaftur beinanvegin uttan at hava kastað.

Vit hava sjálvsagt beinanvegin gjørt Føroya Reiðarafelag vart við brotini, og nú mugu vit so í samráð við okkara advokat finna út av, hvørjar avleiðingarnar skulu verða.

## Tvørir nótareiðarar

Vit mugu eisini staðfesta, at tá tað snýr seg um nótaskipini, sum er tann skipabólkurin, ið er nógv best fyri og hevur nógv tey bestu ráðini, so eydnaðist okkum ikki at fáa reiðararnar í tí bólkinum at flyta seg ein millimetur á nøkrum øki. Teir vóru hvørki til at høgga ella stinga í.

Teirra einasta argument er, at menninir við nótaskipunum tjena so væl, at teir hava ikki uppiborið lønarhækking.

Snildisliga gloyma teir, at teirra reiðaríir hava havt risastóra vinningsframgongd og tjena ørandi upphæddir. Eisini gloyma teir, at teirra tilverugrundarlag fyrst og fremst skyldast vælvild frá manningunum, sum í síni tí, tá hesin veiðubólkurin var í kreppu, sjálvbodnir fóru langt niður í løn – við tí greiða lyfti, at hýruprosentið skuldi uppaftur, tá tíðirnar gjørdust betri.

Tað er ongin loyna, at nevndin í Føroya Fiskimannafelag ikki var samd um, hvussu langt vit skuldu fara í stríðnum við nótaskipini.

Ein partur av nevndini var til reiðar at taka eitt verkfall um neyðugt.

Meirilutin helt tó, at vandin fyri at missa alt tað, sum vit hóast alt høvdu vunnið innaftur fyri restina av heimaflotanum, var ov stórur, um vit slitu samráðingarnar upp á ósemjuna við nótaskipini.

Tískil bleiv semja gjørd í endanum á mai.

## Nýggjan sáttmálabygnað

Ein týðandi partur av semjuni er eisini, at partarnir hava gjørt av at seta ein bólk at arbeiða við at nútímansgera allan sáttmálan.
Talan er um stórarbeiði, sum eg als ikki dugi at meta um, hvussu langa tíð tað fer at taka. Men eg vænti neyvan, at eitt tilmæli um ein heilt nýggjan sáttmálabygnað kann verða klárt hjá øllum pørtum at taka undir við, longu tá verandi sáttmálaskeið er úti.

Tí eru eisini nógv viðurskifti – bæði sáttmálaviðurskifti og lógartryggjað rættindi – ið vit síðuleypandi skulu arbeiða hart fyri at fáa á eitt nøktandi støði, og sum ikki bara kunnu bíða eftir einum heilt nýggjum sáttmálabygnað.

Fyri mítt viðkomandi hevur tað sera høga raðfesting at loysa manningarnar frá øllum rakstrarútreiðslum hjá reiðaríunum, og eg ætli at leggja stóra orku í hetta arbeiðið, fái eg høvi til tess.
Eisini eiga vit at leggja nógva orku í at fáa minstulønina upp og betra um tryggingarnar – hetta seinna komi eg nærri inn á um eitt bil.

Nýggja sáttmálasemjan er galdandi til 1. apríl 2017.

Vanliga hevur sáttmálin verið galdandi til ein 1. januar, men fyri at sleppa undan altíð at koma í karambolasju við millumlanda fiskivinnusamráðingarnar, sum reiðarnir taka lut í, samdust partarnir um at flyta sáttmálaskeiðið tríggjar mánaðir.

Tá alt hetta er sagt um sáttmálasamráðingarnar viðvíkjandi fiskiflotanum, so haldi eg, at vit hóast alt hava loyvi at fegnast um, at tað eisini í sáttmálahøpi gongur rætta vegin fyri tann mest sperda partin av heimaflotanum.

Eg skal ikki gloyma Sjómannadeildina, sum eisini samráddi seg til ein nýggjan sáttmála. Har spældu samráðingarnar sera friðarliga av, og ein tvey ára sáttmáli varð gjørdur við Reiðarafelagið fyri Farmaskip. Lønin hækkaði 1,98 prosent fyrsta mars í ár, og 1. mars næsta ár hækkar hon aftur 2,25 prosent.

## Vánalig trygging

Tað vantar sera nógv í, áðrenn vit kunnu siga, at tryggingarviðurskiftini hjá okkara sjófólki eru nøktandi. Her liggur eitt stórt arbeiði á láni at fáa betri sømdir.

Sjálvsagt er tað so, at tess betri ein trygging er, tess dýrari er hon, og manningarnar eru oftast annaðhvørt beinleiðis ella óbeinleiðis við til at rinda tær.
Men vanlukkutryggingin á sjónum eigur í øllum førum at fáast á eitt nógv betri og rættvísari støði.
Tað er ein trygging, sum reiðarin einsamallur eigur at bera allan kostnaðin av. Tí vanlukkur umborð á skipi henda í prinsippinum altíð, tí arbeiðsplássið í sær sjálvum er vandamikið.

Og tað er reiðarin, ið annaðhvørt einsamallur ella umvegis skiparan varðar av trygdini umborð, altso trygdini á arbeiðsplássinum.

Tí kann tað ikki vera rætt, at menn kunnu missa heilar ársinntøkur, tí teir til dømis eru fyri arbeiðsvanlukku umborð mitt í einari háárstíð, sum teir tískil missa, men bert fáa trygging svarandi til eini 80 prosent av einari arbeiðsmannaløn fyri mista tíðarskeiðið.

Málsviðgerðartíðin í sambandi við vanlukkutrygging er eisini alt ov stirvin, tíðarkrevjandi og møðsom fyri tann skaðarakta og tey avvarðandi.

Vit eru í holtur við at kanna, hvussu tryggingarviðurskiftini kunnu betrast.

## Trygdargrunnurin

Vanliga fáa fiskimenn útgjald úr Trygdargrunni Fiskivinnunar, sjálvt um tað kann vera nakað roksut við at fáa neyðugu undirskriftirnar til vega.

Men í summum førum kann tað tykjast, sum at óneyðugar forðingar eru í reglunum, tá menn, ið hava fingið álvarsligan skaða, av onkrari orsøk ikki er førir fyri at venda sær til tey, ið skulu skriva undir.

Tá lógin er so stirvin, at til dømis ein maður, sum liggur uttan vit í mánaðir, verður noktaður útgjald, so má hon broytast. Alt annað er óðmannaverk.

## Sosiala slagsíðan

Tað er ein sannroynd, at starvsfólk á privata arbeiðsmarkanaðinum, ikki eru eins væl vard, sum tey, ið eru á almenna arbeiðsmarknaðum.
Tí eiga stig at verða tikin til, at eitt nú fiskimenn fáa somu rættindi, sum tey, ið virka undir lógunum og reglunum fyri almenn starvsfólk. Tað má vera ein mannarættur.
Ikki minst tá tað snýr seg um starvstrygd, hevði tað verið ein munandi bati fyri hvønn einasta fiskimann, sum í dag bara kann sigast upp frá degi til dags uttan nakra grundgeving.

Tað hevði eisini verið kærkomið, um fiskimenn kundu fingið somu treytir, sum so nógv onnur fáa frá okkara mynduleikum, soleiðis, at vit ikki bara høvdu eina dagpeningaskipan at dúva upp á, tá sjúka ella skaði rakar. Tað kann ikki vera rætt, at partar av arbeiðsmarkanðinum hava eina góða sosiala skipan, meðan umleið helmingurin av arbeiðandi fjøldini hongur í leysari luft við einari vánaligari trygdarskipan.
Tí má lóggávan broytast soleiðis, at allir føroyingar kunnu vita seg tryggar, tá ið sjúka tekur seg upp.

## Gjald á vinnu og fiskimenn

Føroya Reiðarafelag fekk eina gávu frá undanfarnu samgongu, tá teir fingu loyvi at leggja tilfeingisgjald yvir á manningarnar.
Tað hevur ongantíð verið ætlanin, at eitt gjald á vinnuna skal turkast av upp á starvsfólkið.

Gjaldið er fyri tilfeingið, sum reiðarin hevur rætt at fiska, og manningin hevur onga ávirkan á, hvussu hann fer við hesum rættinum. Heldur ikki fær manningin eitt oyra, tá reiðarar selja síni rættindi víðari til onkran annan.

Tí mótmæltu vit eisini beinavegin, tá reiðarar byjaðu at taka gjaldið av óbýttum. Havast skal eisini í huga, at Føroya Fiskimannafelag alla tíðina hevur mótmælt tilfeingisgjaldi sum heild, júst tí vit hava sæð fyri okkum, at hetta fór at vera ein rokning, sum bleiv send víðari til fiskimenninar.

Føroya Reiðarafelag segði seg hinvegin onki hava í móti einum gjaldi. Tað vóru reiðarar, ið beinleiðis søgdu, at teir gott kundu góðtaka eitt tilfeingisgjald, og tað skuldi vera eitt kilogjald.

Havandi í huga, at reiðarin er sloppin at trekkja partar av sínum tilfeingisgjaldi av yvir raksturin – av óbýttum – so vórðu tað manningarnar, sum blivu tann stóri taparin.

Men bæði land og komunur koma eisini at missa. Tí samlaðu inntøkurnar frá avgjøldum og skatti verða minni, tá partur av tilfeingisgjaldinum verður álagt manningini at gjalda.

Tí minni verður hjá manningini at gjalda skatt av, tá tilfeingisgjald fyrst skal gjaldast.

Tað verður sjálvsagt eisini minni hjá reiðarínum at gjalda skatt av, um hon skal rinda alt tilfeingisgjaldið, men her skulu vit minnast til, at partafelagsskatturin bert er 18 prosent.

Var inntøkan hjá monnunum hinvegin hægri, tí teir sluppu undan tilfeingigjaldi, so høvdu teir í flestu førum skula goldið toppskatt av meirinntøkuni, altso umleið 50 prosent.

At reiðarin við verandi praksis sparir tað, sum svarar til hýruprosentið, í tilfeingisgjøldum, er eisini ein beinleiðis rakstrarstuðul. Reiðarin kann jú bara nýta hesar pengarnar, júst sum hann vil. Tað kann ikki vera annað enn hamrandi skeivt.

Vit siga BUMS NEI til at rinda lummapengar til reiðararnar.

## Harðari revsing

Tað má fáa fylgjur, tá menn seta sær fyri at vera reiðarar fyri útlendskar fyritøkur, ið leggja líka í lógir og reglur, sum galda í føroyskum sjóøki.
Tað hava verið fleiri dømir um júst hetta.

Eitt syndarligt mál, ið fekk nógva umrøðu, var málið um Anitu.
Sum kunnugt, so hevði Fiskimannafelagið gjørt vart við hetta í langa tíð. Men tað vísti seg, at tað var sera torført at fáa okkara myndugleikar at taka ábyrgd.
Ikki fyrr enn Fiskimannafelagið hevði meldað fleiri ferðir, fóru mynduleikarnir í holtur við at steðga hesi ránsveiðuni í føroyskum sjóøki.

Tá var ein maður sjólátin.

Vit hava eisini víst á fleiri dømi, sum kunnu samanberast við óregluligu veiðuna hjá Anitu. Men tað tykist sum um, at ávísir reiðarar kunnu gera sum teimum lystir.

Fleiri ferðir hava vit víst á ólógliga arbeiðsmegi og óvirðiligar umstøður hjá manningum. Oftast er hetta bert sligið upp í glens, og tað kann ikki vera annað enn eitt bakkast fyri okkara samfelag, sum annars á flestu økjum sigur seg ikki vilja góðkenna slíkt.

Tí skal tað verða okkara viðmæli, at um reiðarar ikki halda seg til sáttmálaásetingar og til landsins lógir, so eiga teir í stundini at missa øll síni loyvi og rættindi.

## Samanhald og samhaldsfesti

Eisini í 2015 hevur Føroya Fiskimannafelag mugað brúkt nógva orku upp á ávís reiðarí, sum afturvendandi liggja í buktini, tá tað snýr seg um viljan til at halda galdandi sáttmálar.
Eg skal ikki fara at reksa øll málini upp her, og fyri rættvísis sakir skal eisini viðmerkjast, at onkrir av teimum, ið hava verið allar ringast at fingist við, nú tykjast vilja góðtaka, at sáttmálar eru til og mugu haldast.

Eg vil tó fegin nevna Beinisvørð-málið. Tað endaði í rættinum, og har vunnu vit stórsigur fyri einum mánaða síðani.
Við rentum varð reiðaríið dømt at rinda manningini tilsamans 1,8 milliónir krónur fyri ov lítið goldna hýru undir makrelfiskiskapinum í 2011.

Beinisvørð-málið er dømi um eitt mál, har reiðari roynir at ganga uttanum galdandi sáttmála við uppáhaldi um, at onnur avtala er gjørd.
Tað gekk ikki hesaferð, tí menninir lótu seg ikki lumpa.

Men tað hendir alt ov ofta, at reiðarar ganga á menn, fyri at gera eina avtalu uttan um manningarfeløgini, og tíverri sær hetta út til at eydnast til tíðir.

Menn hava í ávísum førum latið seg lokka við gyltum lyftum um fastan kjans og góða fortjenastu, men royndirnar vísa, at lyftini ongantíð standa mát við veruleikan, og menninir standa skjótt eftir á berum. Síðani er tað sum oftast Føroya Fiskimannafelag sum stendur við upptakinum.

Her vil eg bert enn einaferð royna at tala til samvitskuna hjá monnum og vísa á, at tað BARA er við samhaldsfesti og samanhaldi bæði umborð á tí einstaka skipinum og sum limir í Føroya Fiskimannafelag, at vit vinna okkara rættindi og sigrar.
Og tað er eisini BARA við samhaldsfesti og samanhaldi at vit varðveita okkara vunnu rættindi.

## Seinføri í rættarskipanini

Menninir á Beinisvørð stóðu saman, og teir gjørdu tað allan vegin.
Nú er so at vóna, at nakað er at koma eftir, so teir veruliga fáa tað, teir eiga, og sum teir av røttum skuldu fingið beinanvegin í 2011.

Men tað er júst stóri vansin, tá reiðarar fara út um mark. Málini taka sera drúgva tíð at fyrireika, og ofta er viðgerðartíðin í rættarskipanini enn drúgvari.

Sjóveðrættur er bert galdandi í eitt ár, og um Fiskimannafelagið skal taka arrest í skipum, hvørja ferð tann minsti illgrunin er um óreglusemi, ella skipið er í hýru-eftirstøðu, so hevði kassin hjá felagnum verið tómur fyri fleiri árum síðani.

Føroya Fiskimannafelag arbeiðir við fleiri málum, sum taka langa tíð, og okkurt teirra hevur longu tikið alt ov langa tíð. Okkurt mál er á veg í rættarskipanina, og í øðrum málum verður roynt í fyrsta lagi at finna semju.

Felagið hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at okkara rættarskipan arbeiðir alt ov seint. Tað er sera slítandi hjá monnum og teirra avvarðandi, sum bíða ár eftir ár, meðan mál teirra gongur.

Um tað er so, at ikki nóg mikið er av arbeiðsorku í okkara rættarskipan, eigur hon at verða uppnormerað og dagførd soleiðis, at málini ikki kunnu draga út í áravís.
Henda boðskap hava vit endurtikið í fleiri ár.
Eg vil endurtaka hann her og harafturat mæla til, at neyðugu broytingarnar verða framdar í snarheit.

## Trygdarskeið og heilsuváttan

Trygdarskeið og heilsuváttan eru í dag eitt krav, fyri at tú kanst mynstra sum manning.

Tað er onki at taka seg aftur í, at tað eru nógvir fiskimenn, ið halda, at henda skipan ikki eigur at halda áfram eftir tí leisti, hon fylgir í dag.

Tað verður víst á, at tað er bara á pappírinum, at talan er um eitt trygdarskeið. Trygdarskeiðið og Heilsuváttanin verða nevniliga av fleiri mett sum pengamaskinur hjá útbjóðarunum, uttan at innihaldið stendur mát við góðsku og prís.

Tað er átaluvert, at gjaldið fyri trygdarskeiðið var hækkað, tí tað gamla varð mett at vera kappingaravlagandi. Tað má av sonnum vera óhoyrt, at nakað so grundleggjandi fyri trygdina umborð á skipum sum eitt trygdarskeið, kann verða koyrt undir kappingarlógina.

Avleiðingin er, at man ger seg inn á tey, ið hava valt sær sína lívsleið á sjónum. Hví velur man við vælsignilsi frá politiska myndugleikanum henda bólk út at kappast um at hála pening burtur úr? Eg skilji tað ikki.

Tað kann so ikki vera rætt, at ein umsiting ger lógir, ið bert hava til endamáls at fylla í lummarnar hjá spekulantum – og í hesum føri ÚR lummunum hjá fiskimonnum. Sum tað er nú, so tykist tað, at trygdarskeiðið er gjørt fyri tey, ið selja tað, og ikki fyri manningarnar umborð á skipunum.
Heilsuváttanin er eisini lummapengar til læknan og ikki til gagns fyri fiskimannin.

Myndugleikarnir eiga at hava rygg til at steðga hesi eyðræning í stundini, men í staðin sær út til, at teir ætla sær í hina grøvina við nærum at seta akademisk krøv til trygdarskeiðini.

Eftir nýggjastu kunngerðini skulu tey nevniliga um eitt ár fara úr tveimum-trimum døgum upp í tríggjar vikur.

Vónandi finnur onkur skjótt út av, at tað er fullkomiliga burturvið at krevja menn tríggjar vikur á trygdarskeið, og verður tað ikki broytt, verður avleiðingin heilt vist, at skip mugu liggja ómannað við bryggju.

Sjálvsagt skal trygdin umborð á skipunum setast hægri enn nakað annað, og hesum fer Føroya Fiskimannafelag altíð at berjast fyri og halda eitt vakið eyga við. Trygdarskeiðið nýtist tó ikki at verða longri, enn tað er nú, fyri at halda

trygdarstandardin umborð á skipunum og fyri at liva upp til altjóða sáttmálar, sum vit eru partur av.

Men tað, sum krevst, er, at myndugleikarnir síggja til, at innihald og dygd í trygdarskeiðunum eru í hásæti.
Og so eigur regluligt eftirlit sjálvsagt eisini at vera við, at lærdómurin frá trygdarskeiðunum fylgir við monnunum umborð á skipini, soleiðis at regluligar venjingar verða hildnar, og syrgt verður fyri, at øll trygdarútgerð er, sum hon eigur at vera.

---

Eg kundi trivið í mong onnur viðurskifti og hendingar gjøngum árið, men havi valt at leggja dent á tað, sum her er sagt frá, og fari við hesum at enda mína formansfrágreiðing.

Takk fyri.

# Hagtøl

## Ráfiskaprísir

| | Sm. Trolarar | St. Trolarar | Línuskip |
|---|---|---|---|
| 1995 | 5,33 | 6,69 | 7,89 |
| 1996 | 5,32 | 8,09 | 7,65 |
| 1997 | 5,94 | 8,61 | 8,49 |
| 1998 | 7,17 | 9,51 | 10,89 |
| 1999 | 6,86 | 9,75 | 13,25 |
| 2000 | 7,3 | 10,86 | 14,43 |
| 2001 | 6,63 | 9,76 | 15,61 |
| 2002 | 6,3 | 8,72 | 13,22 |
| 2003 | 5,01 | 10,2 | 12,66 |
| 2004 | 4,9 | 10,27 | 10,88 |
| 2005 | 4,64 | 10,17 | 12,76 |
| 2006 | 5,97 | 9,11 | 14,71 |
| 2007 | 6,05 | 9,36 | 16,44 |
| 2008 | 5,6 | 9,43 | 13,99 |
| 2009 | 5,8 | 9,35 | 9,95 |
| 2010 | 7,33 | 9,85 | 11,75 |
| 2011 | 8,48 | 7,16 | 12,56 |
| 2012 | 7,49 | 8,57 | 12,45 |
| 2013 | 5,91 | 5,89 | 10,99 |
| 2014 | 8,52 | 15,3 | 12,42 |
| 2015 | 9,59 | 18,55 | 14,07 |

| **Hækking/lækking** | | | |
|---|---|---|---|
| 1995-2015 | 80 | 177 | 78 |
| 2012-2015 | 28 | 116 | 93 |
| 2014-2015 | 13 | 21 | 13 |

## Inntøkur fiskimanna

| Àr | Dg | Fiski part | Frt.l | Dagst. | Min.l | Tils | Pr.dag kr. | Hækking/lækking í % 06/15 | 13/15 | 14/15 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Stórir ísfiskatrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2015 | 191 | 381 | 46 | 0 | 6 | 433 | 2140 | 20 | 30 | 6 |
| 2014 | 206 | 366 | 45 | 0 | 5 | 416 | 2013 | | | |
| 2013 | 205 | 290 | 36 | 0 | 11 | 337 | 1648 | | | |
| 2012 | 225 | 362 | 44 | 0 | 5 | 411 | 1824 | | | |
| 2011 | 241 | 464 | 56 | 0 | 0 | 520 | 2157 | | | |
| 2010 | 287 | 447 | 55 | 8 | 1 | 511 | 1800 | | | |
| 2009 | 284 | 417 | 52 | 13 | 4 | 482 | 1696 | | | |
| 2008 | 188 | 304 | 37 | 4 | 3 | 345 | 1834 | | | |
| 2007 | 243 | 390 | 47 | 4 | 1 | 442 | 1816 | | | |
| 2006 | 251 | 395 | 48 | 4 | 0 | 447 | 1779 | | | |
| **Smáir ísfiskatrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2015 | 221 | 367 | 43 | 0 | 5 | 415 | 1843 | -5 | 11 | 13 |
| 2014 | 213 | 299 | 37 | 0 | 12 | 348 | 1635 | | | |
| 2013 | 229 | 325 | 41 | 0 | 14 | 380 | 1663 | | | |
| 2012 | 234 | 362 | 45 | 0 | 11 | 418 | 1783 | | | |
| 2011 | 221 | 378 | 46 | 1 | 3 | 428 | 1938 | | | |
| 2010 | 249 | 401 | 49 | 8 | 1 | 460 | 1850 | | | |
| 2009 | 231 | 351 | 43 | 10 | 1 | 405 | 1751 | | | |
| 2008 | 219 | 317 | 39 | 8 | 1 | 365 | 1664 | | | |
| 2007 | 258 | 374 | 46 | 6 | 0 | 426 | 1655 | | | |
| 2006 | 269 | 454 | 55 | 6 | 1 | 516 | 1948 | | | |

| Àr | Dg | Fiski part | Frt.l | Dagst. | Min.l | Tils | Pr.dag kr. | Hækking/lækking í % 06/15 | 13/15 | 14/15 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ísfiskalínuskip** | | | | | | | | | | |
| 2015 | 220 | 254 | 33 | 0 | 20 | 307 | 1478 | 1 | 26 | 13 |
| 2014 | 218 | 233 | 31 | 0 | 22 | 286 | 1308 | | | |
| 2013 | 215 | 194 | 27 | 0 | 32 | 253 | 1176 | | | |
| 2012 | 228 | 216 | 29 | 0 | 22 | 267 | 1170 | | | |
| 2011 | 232 | 218 | 29 | 8 | 19 | 273 | 1178 | | | |
| 2010 | 249 | 220 | 31 | 31 | 8 | 290 | 1164 | | | |
| 2009 | 212 | 117 | 23 | 49 | 23 | 212 | 997 | | | |
| 2008 | 218 | 198 | 28 | 30 | 10 | 266 | 1220 | | | |
| 2007 | 230 | 305 | 38 | 10 | 1 | 354 | 1803 | | | |
| 2006 | 229 | 287 | 36 | 11 | 1 | 335 | 1464 | | | |
| **Hekkutrolarar á flakaveiðu** | | | | | | | | | | |
| 2015 | 197 | 869 | 106 | 0 | 2 | 977 | 5183 | 96 | 35 | 28 |
| 2014 | 233 | 843 | 101 | 0 | 2 | 946 | 4065 | | | |
| 2013 | 243 | 687 | 82 | 0 | 2 | 771 | 3848 | | | |
| 2012 | 294 | 836 | 101 | 0 | 4 | 941 | 3203 | | | |
| 2011 | 263 | 829 | 99 | 0 | 0 | 928 | 3525 | | | |
| 2010 | 298 | 917 | 110 | 0 | 0 | 1027 | 3450 | | | |
| 2009 | 231 | 438 | 53 | 1 | 0 | 491 | 2129 | | | |
| 2008 | 246 | 563 | 68 | 1 | 0 | 632 | 2574 | | | |
| 2007 | 310 | 764 | 92 | 3 | 0 | 859 | 2773 | | | |
| 2006 | 337 | 790 | 95 | 5 | 0 | 890 | 2641 | | | |
| **Garnaskip á svartkalva- og havtaskuveiðu** | | | | | | | | | | |
| 2015 | 199 | 284 | 37 | 0 | 26 | 347 | 2046 | 17 | 24 | 35 |
| 2014 | 189 | 229 | 31 | 0 | 27 | 287 | 1521 | | | |
| 2013 | 258 | 355 | 46 | 0 | 23 | 424 | 1646 | | | |
| 2012 | 108 | 169 | 20 | 0 | 7 | 196 | 1664 | | | |
| 2011 | 189 | 251 | 31 | 2 | 9 | 294 | 1557 | | | |
| 2010 | 160 | 173 | 28 | 12 | 5 | 258 | 1611 | | | |
| 2009 | 230 | 215 | 32 | 38 | 11 | 295 | 1284 | | | |
| 2008 | 212 | 230 | 30 | 17 | 4 | 281 | 1323 | | | |
| 2007 | 265 | 421 | 51 | 9 | 2 | 483 | 1812 | | | |
| 2006 | 272 | 345 | 44 | 14 | 3 | 406 | 1742 | | | |

| | Dg | Fiski part | Frt.l | Dagst. | Min.l | Tils | Pr.dag kr. | Hækking/lækking í % 06/15 | 13/15 | 14/15 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ídnaðarfiskitrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2015 | 158 | 844 | 101 | 0 | 0 | 945 | 7044 | 177 | 62 | 46 |
| 2014 | 146 | 618 | 75 | 0 | 10 | 703 | 4826 | | | |
| 2013 | 193 | 737 | 90 | 0 | 12 | 839 | 4349 | | | |
| 2012 | 167 | 713 | 86 | 0 | 7 | 806 | 4827 | | | |
| 2011 | 91 | 493 | 60 | 0 | 4 | 557 | 6104 | | | |
| 2010 | 203 | 693 | 84 | 9 | 2 | 788 | 3873 | | | |
| 2009 | 105 | 269 | 33 | 6 | 2 | 310 | 2952 | | | |
| 2008 | 152 | 361 | 44 | 4 | 4 | 414 | 2722 | | | |
| 2007 | 135 | 348 | 43 | 7 | 5 | 403 | 2992 | | | |
| 2006 | 135 | 262 | 37 | 25 | 19 | 343 | 2543 | | | |
| **Nótaskip** | | | | | | | | | | |
| 2015 | 194 | 1423 | 169 | 0 | 2 | 1594 | 8197 | 87 | 16 | 14 |
| 2014 | 222 | 1417 | 171 | 0 | 8 | 1596 | 7196 | | | |
| 2013 | 207 | 1302 | 156 | 0 | 2 | 1460 | 7043 | | | |
| 2012 | 193 | 1291 | 155 | 0 | 2 | 1448 | 7489 | | | |
| 2011 | 181 | 1516 | 183 | 0 | 4 | 1703 | 9435 | | | |
| 2010 | 238 | 1362 | 162 | 6 | 8 | 1541 | 6479 | | | |
| 2009 | 177 | 726 | 89 | 7 | 7 | 828 | 4663 | | | |
| 2008 | 239 | 843 | 103 | 7 | 8 | 961 | 4021 | | | |
| 2007 | 280 | 1036 | 126 | 7 | 8 | 1177 | 4210 | | | |
| 2006 | 240 | 927 | 112 | 5 | 5 | 1049 | 4379 | | | |
| **Rækjutrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2015 | 227 | 777 | 80 | 0 | 0 | 857 | 3801 | 153 | 34 | 11 |
| 2014 | 240 | 731 | 88 | 0 | 6 | 825 | 3435 | | | |
| 2013 | 247 | 625 | 75 | 0 | 2 | 702 | 2845 | | | |
| 2012 | 323 | 836 | 100 | 0 | 0 | 936 | 2903 | | | |
| 2011 | 349 | 773 | 93 | 0 | 0 | 865 | 2479 | | | |
| 2010 | 297 | 588 | 71 | 3 | 0 | 662 | 2269 | | | |
| 2009 | 352 | 610 | 74 | 4 | 3 | 691 | 1965 | | | |
| 2008 | 367 | 654 | 79 | 1 | 0 | 733 | 1995 | | | |
| 2007 | 304 | 536 | 65 | 3 | 0 | 604 | 1989 | | | |
| 2006 | 239 | 315 | 38 | 5 | 0 | 358 | 1500 | | | |

## Gongdin í daginntøkuni hjá ísfiskamonnum sammett við daglønir á landi 1995-2015

| Ár | Tíma løn | Dagløn 8 tímar | Daglønir, alt íroknað og lutfall við daglønir á landi | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | Ísfiskalínuskip | | Stórir ísfiskatrol | | Smáir ísfiskatrol | |
| 1995 | 83,64 | 669 | 756 | 1,1 | 831 | 1,2 | 940 | 1,4 |
| 1996 | 83,64 | 669 | 853 | 1,3 | 905 | 1,4 | 1052 | 1,6 |
| 1997 | 84,96 | 680 | 1085 | 1,6 | 966 | 1,4 | 1109 | 1,6 |
| 1998 | 85,81 | 686 | 1539 | 2,2 | 1239 | 1,8 | 1676 | 2,4 |
| 1999 | 89,79 | 718 | 1417 | 2,0 | 1200 | 1,7 | 1460 | 2,0 |
| 2000 | 93,77 | 750 | 1255 | 1,7 | 1398 | 1,9 | 1694 | 2,3 |
| 2001 | 98,52 | 788 | 1484 | 1,9 | 1584 | 2,0 | 1892 | 2,4 |
| 2002 | 103,26 | 826 | 1732 | 2,1 | 1728 | 2,1 | 1855 | 2,2 |
| 2003 | 108,08 | 865 | 1826 | 2,1 | 1652 | 1,9 | 1473 | 1,7 |
| 2004 | 112,9 | 903 | 1326 | 1,5 | 1577 | 1,7 | 1358 | 1,5 |
| 2005 | 112,9 | 903 | 1290 | 1,4 | 1824 | 2,0 | 1619 | 1,8 |
| 2006 | 112,9 | 903 | 1464 | 1,6 | 1779 | 2,0 | 1948 | 2,2 |
| 2007 | 117,07 | 937 | 1536 | 1,6 | 1815 | 1,9 | 1655 | 1,8 |
| 2008 | 119,67 | 957 | 1234 | 1,3 | 1820 | 1,9 | 1609 | 1,7 |
| 2009 | 122,38 | 979 | 997 | 1 | 1697 | 2 | 1751 | 1,8 |
| 2010 | 123,61 | 989 | 1169 | 1,2 | 1819 | 1,8 | 1878 | 1,9 |
| 2011 | 126,02 | 1008 | 1170 | 1,2 | 1820 | 1,8 | 1879 | 1,9 |
| 2012 | 127,44 | 1020 | 1171 | 1,1 | 1821 | 1,8 | 1880 | 1,8 |
| 2013 | 129,52 | 1036 | 1182 | 1,1 | 1640 | 1,6 | 1686 | 1,6 |
| 2014 | 131,98 | 1056 | 1308 | 1,2 | 2013 | 1,9 | 1635 | 1,5 |
| 2015 | 134,89 | 1079 | 1478 | 1,4 | 2140 | 2,0 | 1843 | 1,7 |

Í tímalønini er rokna frítíðarløn. Í daglønum hjá fiskimonnum eru íroknaðar allar viðbøtur. Fyri 2015 er lutvíst gjørt upp inntøkan higartil í 2015 og lutvíst tann inntøka, sum roknast kann við við verandi veiðu og prísum. Tað, sum fiskimenn fáa útyvir eina dagløn á landi (t.v.s tað, sum er útyvir 1 í tavluni), er tann viðbót, sum fiskimenn fáa fyri teirra arbeistíð útyvir 8 tímar, fyri at arbeiða allar dagar í vikuni v.m.

## Gongdin í veiðu- og veiðusamanseting

Vit hava síðan 1975 gjørt upp gongdina í veiðu og veiðusamanseting hjá ísfiskaskipum.
Gongdin síðan 1999 hevur verið hendan:

**Smáir trolarar**

| (Í %) | | 15 | 14 | 13 | 12 | 11 | 10 | 9 | 8 | 7 | 6 | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | 0 | 99 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tosk | 1 partr | 1 | 0 | 0 | 0 | 1 | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 |
| - | 1 lem.tr. | | | | | | | 0 | 0 | 1 | 1 | 25 | 23 | 41 | 62 | 58 | 64 | 31 |
| Tosk | 2 partr. | 4 | 4 | 2 | 3 | 6 | 4 | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 7 | 5 | 6 | 7 | 8 | 7 |
| - | 2 lem.tr. | | | | | | | 0 | 0 | 17 | 21 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Hýsa | partr. | 1 | 1 | 1 | 0 | 1 | 1 | 2 | 2 | 3 | 2 | 2 | 4 | 6 | 6 | 5 | 8 | 8 |
| - | lem.tr. | | | | | | | 0 | 0 | 43 | 23 | 27 | 25 | 27 | 28 | 32 | 26 | 34 |
| Upsi | partr. | 79 | 84 | 51 | 62 | 67 | 84 | 91 | 91 | 90 | 90 | 76 | 72 | 64 | 63 | 61 | 60 | 60 |
| - | lem.tr. | | | | | | | 0 | 0 | 8 | 15 | 8 | 9 | 3 | 1 | 2 | 1 | 24 |
| Kongaf. | partr. | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 |
| - | lem.tr. | | | | | | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 4 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Blálon. | partr. | 1 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| - | lem.tr. | | | | | | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Annað | partr. | 13 | 10 | 45 | 34 | 23 | 10 | 6 | 5 | 5 | 6 | 20 | 15 | 23 | 23 | 25 | 21 | 22 |
| - | lem.tr. | | | | | | | 0 | 0 | 31 | 40 | 40 | 39 | 28 | 9 | 8 | 9 | 11 |
| Í alt % | partr. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Stórir trolarar**

| (Í %) | | 15 | 14 | 13 | 12 | 11 | 10 | 9 | 8 | 7 | 6 | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | 0 | 99 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur 1 | | 9 | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | 3 | 1 |
| Toskur 2 | | 3 | 14 | 1 | 1 | 2 | 3 | 2 | 10 | 8 | 6 | 21 | 19 | 18 | 4 | 6 | 14 | 9 |
| Hýsa | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 | 2 | 7 | 3 | 3 | 7 |
| Blálonga | | 4 | 8 | 1 | 1 | 2 | 8 | 4 | 3 | 4 | 7 | 6 | 6 | 10 | 3 | 7 | 7 | 11 |
| Upsi | | 26 | 17 | 16 | 40 | 26 | 44 | 51 | 54 | 57 | 53 | 44 | 25 | 29 | 45 | 44 | 30 | 22 |
| Kongafiskur | | 7 | 4 | 1 | 1 | 2 | 10 | 8 | 6 | 5 | 13 | 11 | 18 | 11 | 11 | 23 | 27 | 34 |
| Svartkalvi | | 35 | 30 | 5 | 7 | 6 | 7 | 11 | 3 | 2 | 3 | 2 | 3 | 2 | 2 | 4 | 7 | 6 |
| Stinglaksur | | 10 | 11 | 2 | 2 | 3 | 7 | 6 | 6 | 3 | 3 | 2 | 5 | 8 | 5 | 2 | 1 | 0 |
| Annað | | 6 | 15 | 73 | 48 | 59 | 20 | 17 | 16 | 19 | 13 | 12 | 22 | 19 | 22 | 9 | 8 | 8 |
| Í alt % | partr. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

**Línuskip**

| (Í %) | 15 | 14 | 13 | 12 | 11 | 10 | 9 | 8 | 7 | 6 | 5 | 4 | 3 | 2 | 1 | 0 | 99 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur 1 | 8 | 8 | 12 | 7 | 7 | 5 | 5 | 5 | 4 | 4 | 5 | 6 | 14 | 9 | 8 | 13 | 15 |
| Toskur 2 | 41 | 23 | 28 | 17 | 22 | 19 | 19 | 23 | 24 | 20 | 18 | 23 | 27 | 35 | 26 | 17 | 15 |
| Hýsa | 14 | 14 | 11 | 7 | 9 | 13 | 16 | 19 | 33 | 36 | 45 | 39 | 38 | 37 | 35 | 40 | 41 |
| Blálonga | 1 | 1 | 3 | 5 | 8 | 4 | 3 | 2 | 16 | 15 | 10 | 11 | 7 | 9 | 14 | 14 | 13 |
| Upsi | 3 | 2 | 3 | 3 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Kongafiskur | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 13 | 15 | 11 | 11 | 6 | 5 | 8 | 8 | 9 |
| Svartkalvi | 2 | 1 | 1 | 6 | 3 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Stinglaksur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Annað | 29 | 50 | 41 | 54 | 50 | 57 | 55 | 49 | 8 | 9 | 11 | 10 | 8 | 5 | 9 | 8 | 7 |
| Í alt % partr. | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

## Gongdin í ísfiskaveiðuni

**Línuskip**

| Àr | Veiða pr. dag | Menn | pr. Mann pr.dag |
|---|---|---|---|
| 1983 | 3900 | 15 | 260 |
| 1984 | 3900 | 15 | 260 |
| 1985 | 3800 | 15 | 253 |
| 1986 | 3500 | 14 | 250 |
| 1987 | 3600 | 14 | 257 |
| 1988 | 3400 | 13,3 | 256 |
| 1989 | 3600 | 14 | 257 |
| 1990 | 3100 | 14 | 221 |
| 1991 | 2600 | 14 | 186 |
| 1992 | 2300 | 14 | 164 |
| 1993 | 2250 | 14 | 161 |
| 1994 | 2760 | 14 | 197 |
| 1995 | 2830 | 14 | 202 |
| 1996 | 3720 | 14 | 266 |
| 1997 | 4500 | 14 | 321 |
| 1998 | 4800 | 14 | 343 |
| 1999 | 3750 | 13,8 | 272 |
| 2000 | 3020 | 13,7 | 220 |
| 2001 | 3340 | 13,6 | 246 |
| 2002 | 4519 | 13,6 | 332 |
| 2003 | 5184 | 14,1 | 368 |
| 2004 | 4342 | 13,9 | 312 |
| 2005 | 3722 | 13,8 | 270 |
| 2006 | 3581 | 13,6 | 263 |
| 2007 | 3313 | 13,4 | 247 |
| 2008 | 3069 | 13,4 | 229 |
| 2009 | 3046 | 13,6 | 224 |
| 2010 | 3735 | 13,8 | 271 |
| 2011 | 3709 | 13,8 | 269 |
| 2012 | 3772 | 13,8 | 273 |
| 2013 | 4070 | 13,6 | 299 |
| 2014 | 3968 | 13,4 | 296 |
| 2015 | 3664 | 13,2 | 278 |

**Smáir trolarar**

| Àr | Veiða pr. dag | Menn | pr. Mann pr.dag |
|---|---|---|---|
| 1980 | 3400 | 6,5 | 523 |
| 1981 | 3500 | 6,5 | 538 |
| 1982 | 3700 | 6,5 | 569 |
| 1983 | 4700 | 7 | 671 |
| 1984 | 4800 | 7,4 | 649 |
| 1985 | 4170 | 7,4 | 564 |
| 1986 | 5500 | 7,6 | 724 |
| 1987 | 4700 | 7,6 | 618 |
| 1988 | 5100 | 7,6 | 671 |
| 1989 | 3800 | 7,4 | 514 |
| 1990 | 4100 | 7,8 | 526 |
| 1991 | 4900 | 8,7 | 563 |
| 1992 | 4000 | 8,7 | 460 |
| 1993 | 3420 | 8,4 | 407 |
| 1994 | 3130 | 8,5 | 368 |
| 1995 | 2765 | 7 | 395 |
| 1996 | 3137 | 6,7 | 468 |
| 1997 | 3950 | 5 | 790 |
| 1998 | 4900 | 5 | 980 |
| 1999 | 3344 | 4,9 | 682 |
| 2000 | 4595 | 5 | 919 |
| 2001 | 4013 | 5 | 803 |
| 2002 | 4588 | 5 | 918 |
| 2003 | 2769 | 5 | 554 |
| 2004 | 2505 | 4 | 626 |
| 2005 | 2867 | 5 | 573 |
| 2006 | 2992 | 5 | 598 |
| 2007 | 2880 | 5 | 576 |
| 2008 | 1851 | 5 | 370 |

**Partrolarar**

| Àr | Veiða pr. dag | Menn | pr. Mann pr.dag |
|---|---|---|---|
| 1990 | 3300 | 6 | 550 |
| 1991 | 2900 | 5,8 | 500 |
| 1992 | 2900 | 6,2 | 468 |
| 1993 | 3350 | 6,4 | 523 |
| 1994 | 3860 | 6,6 | 585 |
| 1995 | 3846 | 7,3 | 527 |
| 1996 | 4012 | 6,4 | 627 |
| 1997 | 3995 | 6,5 | 615 |
| 1998 | 4900 | 6,5 | 754 |
| 1999 | 4800 | 6,5 | 738 |
| 2000 | 5305 | 6,5 | 816 |
| 2001 | 6587 | 6,5 | 1013 |
| 2002 | 6878 | 6,5 | 1058 |
| 2003 | 6790 | 6,5 | 1045 |
| 2004 | 6234 | 6,5 | 959 |
| 2005 | 8276 | 6,5 | 1273 |
| 2006 | 7637 | 6,4 | 1193 |
| 2007 | 6410 | 6,4 | 1002 |
| 2008 | 6881 | 6,4 | 1075 |
| 2009 | 7206 | 6,5 | 1109 |
| 2010 | 5966 | 6,5 | 918 |
| 2011 | 5821 | 6,4 | 910 |
| 2012 | 6443 | 6,5 | 991 |
| 2013 | 7220 | 6,5 | 1111 |
| *2014 | 4876 | 6,5 | 750 |
| *2015 | 4733 | 6,5 | 728 |

Tølini fyri 2015 eru fyribilstøl, gjørd upp eftir avrokningum, sum eru innkomnar pr. 18/12-2015

*Makrelveiðan er ikki við í ár í mun til 2013

**Stórir trolarar**

| Àr | Veiða pr. dag | Menn | pr. Mann pr.dag |
|---|---|---|---|
| 1984 | 8300 | 12 | 692 |
| 1985 | 6670 | 12 | 556 |
| 1986 | 6800 | 12,4 | 548 |
| 1987 | 6800 | 12,4 | 548 |
| 1988 | 6700 | 12,6 | 532 |
| 1989 | 5700 | 12,1 | 471 |
| 1990 | 6400 | 12 | 533 |
| 1991 | 6600 | 12 | 550 |
| 1992 | 5800 | 12,4 | 468 |
| 1993 | 4740 | 12,8 | 370 |
| 1994 | 4460 | 12,9 | 346 |
| 1995 | 4774 | 12,7 | 376 |
| 1996 | 4492 | 12,5 | 359 |
| 1997 | 4287 | 11,6 | 370 |
| 1998 | 4841 | 11,3 | 428 |
| 1999 | 4656 | 11,1 | 419 |
| 2000 | 4880 | 10,7 | 456 |
| 2001 | 6131 | 10,6 | 578 |
| 2002 | 7731 | 10,6 | 729 |
| 2003 | 6055 | 10,5 | 577 |
| 2004 | 5603 | 10,2 | 549 |
| 2005 | 6208 | 10,1 | 615 |
| 2006 | 6752 | 9,9 | 682 |
| 2007 | 6640 | 9,7 | 685 |
| 2008 | 6272 | 9,6 | 653 |
| 2009 | 5969 | 9,6 | 622 |
| 2010 | 5809 | 8,5 | 683 |
| 2011 | 9737 | 8 | 1217 |
| 2012 | 7738 | 8 | 967 |
| 2013 | 10054 | 8,7 | 1156 |
| *2014 | 4486 | 8,7 | 516 |
| *2015 | 3795 | 8,7 | 436 |

## Avreiðingarprísir 2005 - 2015

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 201 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 1676 | 1849 | 2270 | 2077 | 1293 | 1413 | 1470 | 1864 | 135 |
| Hýsa | 1019 | 871 | 1132 | 1177 | 778 | 998 | 902 | 1027 | 117 |
| Brosma | 514 | 648 | 691 | 641 | 465 | 601 | 561 | 780 | 65 |
| Longa | 821 | 962 | 1035 | 1265 | 625 | 919 | 928 | 1009 | 108 |
| Upsi | 410 | 460 | 509 | 420 | 493 | 617 | 759 | 891 | 75 |
| Kalvi | 4060 | 4141 | 4474 | 3784 | 3137 | 4156 | 4818 | 6020 | 710 |
| Kongafiskur | 726 | 812 | 805 | 849 | 658 | 699 | 783 | 998 | 97 |
| Blálonga | 938 | 1041 | 1098 | 844 | 635 | 847 | 1002 | 974 | 93 |
| Svartkalvi < 3 kg | 1557 | 1799 | 2128 | 1965 | 1572 | 15 | 2563 | 2575 | 245 |

Tølini fyri tosk, hýsu og upsa frá 2005 eru miðalprísir fyri allar støddir.